Toll- og Skattstova Føroya, Eysturoyar Øki

# Starv á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, er starv leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Høvuðsuppgávur:** Eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, toll, skatt, innkrevjing o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum.

**Førleikakrøv:** Tann, sum verður settur, skal hava roknskaparligan førleika, og skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og Skattstovan bjóðar, eitt nú merconom, HD o.a., og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða** eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving,

- klokkuskipan við flextíð, og
- eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðs umhvørvi.

**Setanartreytir:** Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, sum settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

**Nærri frágreiðing um starvið** fæst við at seta seg í samband við Ingolf Lamhauge, økisstjóra, tlf. 448588.

**Umsóknir:** Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir, skal sendast til

**Toll- og Skattstovu Føroya,**
Eysturoyar Øki,
Postboks 225,
600 Saltangará

**innan 15. oktober 2000.**

**Um stovnin:** Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri,í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og í Tórshavn, røkja raksturin. Í Eysturoyar øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast 16 fólk.

**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*
**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*
**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*
ADC
**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

Fiskimálastýrið

# Løgfrøðingur til Fiskimálastýrið

Fiskimálastýrið umsitur málsøkið tilbúgving og fer undir at fremja eina skipaða tilbúgving fyri Føroyar við tí endamáli at fyribyrgja, avmarka og veita hjálp, tá skaðar henda á persónar, ognir og umhvørvi, orsaka av vanlukkutilburðum og katastrofustøðum, ella tá stórur vandi er fyri hesum.

Til tess at fyrireika nýggja lóggávu viðvíkjandi málsøkinum tilbúgving og umsita aðra lóggávu á sjóvinnuøkinum verður við hesum søkt eftir løgfrøðingi til áhugavert og fjølbroytt starv í Fiskimálastýrinum.

**Starvið**
Høvuðsuppgávan hjá løgfrøðinginum verður at veita løgfrøðiliga ráðgevin go at hava løgfrøðilgia málsviðgerð innan tilbúgvingarmál og fiskivinnu- og sjóvinnumál, herundir bjarging og trygd á sjónum.

**Førleikakrøv**
Kravt verður, at umsøkjarin hevur:

- løgfrøðiliga útbúgving
- góðan kunnleika til føroyskt og enskt mál
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni og evni at fyriskipa

Fyrimunur er, um viðkomandi hevur starvsroyndir innan økið.

**Treytir**
Setanartreytir og løn verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøki er Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt onnur aðalstýrir og løgmansskrivstovuna.

**Umsókn**
Umsóknir, við avriti av prógvum møguligum viðmælum, skulu vera Fiskimálastýrinum í hendi í seinasta lagi týsdagin 10. oktober 2000.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálastýrið**
Postboks 347
FO-110 Tórshavn

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Fiskimálastýrið á tlf. 353030 og tosa við Kaj P. Mortensen, aðalstjóra.

VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820

Fiskimálastýrið

# Samskipari til Fiskimálastýrið

Fiskimálastýrið umsitur málsøkið tilbúgving og fer undir at fremja eina skipaða tilbúgving fyri Føroyar við tí endamáli at fyribyrgja, avmarka og veita hjálp, tá skaðar henda á persónar, ognir og umhvørvi, orsaka av vanlukkutilburðum og katastrofustøðum,ella tá stórur vandi er fyri hesum.

**Starvið**
Høvuðsuppgávan er sambært tilbúgvingarlógini at hava eftirlit og at samskipa tilbúgvingarpartarnar og skipanirnar og at ráðgeva myndugleikunum í tilbúgvingarmálum.

- At áseta fyrisitingarligar reglur á økjum og veita ráðgeving um galdandi lóggávu og um onnur viðurskifti á tilbúgvingarøkinum.
- At ráðgeva landsstýrismanninum og miðfyrisitingini annars um faklig viðurskifti á tilbúgvingarøkinum og harvið eisini tryggja áhaldandi eftirmeting og kunning um royndirnar viðvíkjandi galdandi lóggávu á tilbúgvingarøkinum.
- At ráðgeva landsstýrismanninum um møguligan tørv á broytingum ella víðkan av galdandi lóggávu fyri tilbúgvingarøki.

**Førleikakrøv**
Kravt verður, at umsøkjarin hevur:

- útbúgving á hægri stigi so sum verkfrøði ella líknandi ella, at viðkomandi hevur starvsroyndir innan hetta økið
- starvsroyndir við atliti av samskipan og innlit í tilbúgving
- góðan kunnleika til føroyskt og enskt mál
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni og evni at fyriskipa

**Treytir**
Setanartreytir og løn verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøki er Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt onnur aðalstýrir og løgmansskrivstovan.

**Umsókn**
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskimálastýrinum í hendi í seinasta lagi týsdagin 10. oktober 2000.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálastýrið**
Postboks 347
FO-110 Tórshavn

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Fiskimálastýrið á tlf. 353030 og tosa við Kaj P. Mortensen, aðalstjóra.

**DANNY TRANSPORT**
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 319192



**Føroyahúsið í Keypmannahavn søkir**

# fólk til kaffistovuna

Kaffistovan í Føroyahúsinum er miðdepilin í húsinum, hagar fólk leita sær innar at lesa bløð, lána bøkur, og keypa sær ein drekkamunn. Men teimum dámar eisini væl at fáa okkurt vælsmakkandi heimabakað afturvið. Javnan eru eisini tiltøk, veitslur ella útleigur, har døgverði ella sjálvtøðuborð er ein týðandi partur.

Stundir skulu vera til tey, sum koma inn á gólvið, eitt prát ella hjálp við upplýsingum ella vegleiðing av alskyns slag. Tað ræður um at viðskiftafólk okkara kenna tað heimligt og hugnaligt í kaffistovuni.

Kaffistovan er eisini mentanarmiðdepil við fyrilestrum, kjakfundum, kafékvøldum, kvøldum við veitslum, konsertum og tílíkum. Tí kunna dagarnir verða sera ójavnir, summir friðarligir og fittligir, aðrir strævnir og kravmiklir. Eisini tá ið slík tiltøk eru, skal havast í huga at vit arbeiða í Føroyahúsinum, sum er miðdepil føroyinga í Keypmannahavn og eitt føroyskt andlit í býnum.

Mong feløg eru í húsinum, sum skulu lívgast, so væl til ber. Eisini feløgini uttanum skulu fáa so góðar sømdir okkum ber til at geva. Feløgini og einstaklingar mynda og skapa lív í húsinum.

Av størsta týdningi er, at tú hevur hug at arbeiða júst í kaffistovuni í Føroyahúsinum. Uttan áhuga, áræði og ágrýtni dugir ikki.

Vit søkja eftir einum fólki k/m, sum serstakliga kann vera við til at skapa omanfyri nevnda karm um kaffistovuna og sum eigur hesar dygdir:

- dugir at matgera og baka
- dugir alt vanligt køksarbeiði
- dugir at meta um brúk og keypa inn
- dugir at lúka neyðug krøv til reinleika og ordan
- hevur áhuga fyri vælferð og trivnað hjá øðrum
- er sjálvbjargin, álítandi og tolin
- er hugað at samstarva við øðrum fólki og sjálvbodnum í húsinum
- lagar seg eftir skiftandi arbeiðstíðum
- dugir at orða seg í talu og skrift á føroyskum og donskum.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast hjá leiðaranum í húsinum, Martin Fjallstein. Umsókn verður send til Føroyahúsið í Keypmannahavn, Vesterbrogade 17A, 1620 København V. Umsóknarfreistin er týsdagin 10. oktober.

**Føroyahúsið í Keypmannahavn**

# Stovnandi aðalfundur

av Sandoyar sýslu Vinnuráð verður mánadagin 2. okt kl. 19.30 í kantinuni á Sandoy Seafood í Skopun.

**Fyrireikingarnevndin**

# VÆLLØNT LEIÐARASTARV

Smoltstøð okkara hevur brúk fyri nýggjum rakstrarleiðara. Til rætta umsøkjaran bjóða vit góða løn og góðar starvstreytir.

**Harafturat bjóða vit:**

- eitt starv í eini fyritøku í støðugari menning
- eitt starv við avbjóðingum
- eitt starv við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning

**Okkara ynski er:**

- at tú hevur góð samstarvsevni
- at tú vilt skapa góð úrslit
- at tú hevur ans fyri góðsku
- at tú hevur teldukunnleika

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur hóskandi útbúgving sum t.d. verkfrøðingur, lívfrøðingur ella maskinmeistari. Hetta er tó eingin treyt.

Fleiri upplýsingar fáast við at ringja 333257/210916 og tosa við Atla Gregersen.

Umsóknarfreistin er 14. oktober 2000

Umsóknirnar, ið verða viðgjørdar í trúnaði, skulu sendast til:

**FÚTAKLETTUR**
360 Sandavágur
Tel 333 257 · Fax 333 264

**P/F Fútaklettur framleiðir laksasmolt, laksarogn og lívfisk. Felagið hevur umboð fyri norsku fóðurfyritøkuna Ewos og hevði í 1999 23 ársverk og ein umsetning uppá 18 milliónir krónur.**

SANSIR TEL 355 355

# Dagrøktarmammur

Søkt verður eftir dagrøktarmammum til Fuglafjarðar kommunu at byrja 15. oktober 2000.

Møguligar umsóknir skulu vera skrivligar og skulu vera Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi:

**Týsdagin 10. oktober 2000 kl. 16.00.**

Kommunan skilir sær rætt til at velja ímillum umsóknirnar, ella onga at taka.

**Fuglafjarðar býráð**

**Arbeiðseftirlitið**
Falkavegur 6 · P.O. Box 1134 · FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tlf. +298 317811 · Fax +298 314489
E-mail: info@arbeidseftirlit.fo

# Epoxyskeið í Tórshavn

**Fríggjadagin 6. oktober 2000 kl. 9-16**

# Trukkskeið í Klaksvík

**Týsdagin 10. og mikudagin 11. oktober 2000.**

Tilmelding á telefon **317811**

**Arbeiðseftirlitið**